Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjørt Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Um at góðskutryggja avgerðir í barnarverndarmálum

Spurningar:
- Í hvønn mun verða avgerðir, tiknar av Høvuðsbarnaverndarnevndini um at seta børn heiman, eftirmettar ella endurmettar – hvussu ofta og av hvørjum?
- Verður nøkur óheft dygdarmeting, eftirkanning ella stakroynd av barnaverndarmálum gjørd, fyri at tryggja, at skipanin virkar nóg væl, og at tiknu avgerðirnar altíð eru gjørdar á nóg dyggum grundarlag?
- Í hvønn mun fáa foreldur, sum hava fingið frátikið børn síni, møguleika fyri hjálp og stuðli til at fáa samskifti og samband við fosturforeldur og við barnaverndartænastuna at virka væl - til dømis hjálp at mekla og handfara konfliktir?
- Hevur landsstýrismaðurin nakra ætlan um at uppraðfesta barnaverndarøkið og at gera broytingar í barnarverndarlóggávuni - og um ja, hvørjar broytingar verður talan um?

Viðmerkingar:
Sambært seinastu ársfrágreiðing hjá Løgtingisins umboðsmanni eru nógvar klagur um viðgerð av barnaverndarmálum. Løgtingslóg um barnavernd hevur sum endamál ”at tryggja, at børn, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, fáa neyðuga hjálp og umsorgan í rættari tíð, og at hjálpa teimum við at fáa ein tryggan uppvøkstur.”

Á leið 120 børn í Føroyum eru umsorgarnaryvirtikin, flestu teirra sett til fosturs og nøkur á stovni. Við hvørt kunnu umstøðurnar vera so álvarsamar, at tað, at taka barnið heiman, er einasta loysnin. Samstundis er umráðandi, at myndugleikin ger alt, sum gerast kann, fyri at veita ta hjálp og tann stuðul, sum skal til, fyri at børnini kunnu vaksa upp hjá foreldrum sínum í teimum førum, har tað er ráðiligt og best fyri barnið, eisini í einum longri høpi.

Føroyar hava eina væl útbygda barnaverndartænastu, sum setir tað, tey meta vera barnsins besta, fremst. Tá børn verða tikin heiman, er tað ein avgerð, ið fær heilt grundleggjandi ávirkan á barnsins lív, uppvøkstur og framtíð. Og at missa børn síni, tí hesi verða umsorgarnaryvirtikin, man uttan iva vera eitt hitt mest skakandi og ógvusliga, sum ein familja kann uppliva.

Barnsins besta má og skal altíð setast fremst. Tí er neyðugt at tryggja, at allar avgerðir um at seta børn heiman eru rættar og byggja á so holt grundarlag, sum yvirhøvur til

ber. Samstundis má skipanin rúma teirri ófatiligu frustrasjón og sorg, sum foreldur, ið verða frátikin børn síni, uppliva. Í slíkum førum kann samskifti vera trupult, og tvørrandi samskifti kann gera støðuna verri bæði fyri børnini og foreldrini. Barnaverndarmyndugleikin hevur tí eisini ábyrgd av at fáa samskiftið við foreldrið/foreldrini og millum hesi og fosturforeldrini at ganga so væl, sum til ber – alt til barnsins besta.

Talan er um eym og viðbrekin mál, har rúm ikki er fyri skeivum avgerðum. Tí er tað eisini umráðandi, at politiski myndugleikin tryggjar, at skipanin hevur nóg nógvar resursir til at virka so væl, sum yvirhøvur ber til.

Á Løgtingi, 23. juni 2021

Bjørt Samuelsen